# 10 fáa bót fyri at koyra ov skjótt

**Herfyri gjørdi løgreglan ferðmátingar í Norðoyggjum. Nakrir bilførarar, sum koyrdu ov skjótt, vórðu steðgaðir, og somuleiðis steðgaði løgreglan nøkrum prutlum, sum eisini brutu ferðslulógina**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinast, eitt løgreglulið úr Havn var í Klaksvík og gjørdi ferðmátingar saman við løgregluni á staðnum, fevndu kanningarnar um tveir fylgjandi dagar.

Ferðmátingar vórðu gjørdar bæði í bygdum og í óbygdum øki.

Tilsamans 10 bilførarar vórðu steðgaðir fyri at koyra ov skjótt, men løgreglan sigur, at eingin av hesum koyrdi yvir 80 km/f á bygdum øki - og ikki yvir 110 km/t á óbygdum øki.

Sostatt noyðist eingin av teimum, sum sótu aftanfyri rattið hesar báðar dagarnar í Norðoyggjum, upp til nýggja koyriroynd orsakað av hesum kanningum.

- Í staðin fáa hesir 10 bilførararnir eina bót í part, sigur løgreglan.

Úr Klaksvík verður annars sagt, at løgreglan hesar báðar dagarnar eisini steðgaði einum 4-5 prutlum, har førararnir brutu ferðslulógina.

Løgreglan sigur, at dagarnir, tá ið kanningarnar skuldu gerast í Norðoyggjum, vóru ásettur í góðari tíð.

- Veðrið var heldur vánaligt; tað var vindur og regn, og tað er sjáldan í slíkum veðri, at fólk koyra so skjótt, verður sagt.

# Sjógvurin við Føroyar er saltari og heitari

**Hitin og saltinnihaldið í sjónum kring Føroyar og inni á landgrunninum er vaksið nógv síðan 1995**

SALT OG SJÓGVUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Seinastu 10 árini er methøgt saltinnihald mált í sjónum, sum streymar úr Atlantshavinum og inn í Norðurhøv og Arktis. Hesir streymar eru høvuðslið í tí heimsfevnandi rákinum, sum rópt verður tað "thermohalina-rákið".

Hitin og saltinnihaldið í sjónum kring Føroyar og inni á landgrunninum er eisini vaksið nógv síðan 1995.

- Í árunum 2002-2004 var sjógvurin heitari, enn hann áður er máldur síðan regluligar hitamátingar byrjaðu í 1914. Sama gongd er eisini at síggja í hita og saltinnihaldi kring Ísland og úr Írlandi upp til Svalbards, sigur Fiskirannsóknarstovan.

Sjógvurin, sum rekur fram við Føroyum, kemur úr økinum vestanfyri Írland.

- Hita-og saltbroytingar hava avleiðingar við sær fyri vistskipanina í sjónum og møguliga eisini fyri rákið á heimshøvum.

Fiskirannsóknarstovan heldur, at hitaøkingin síðan 1995 longu hevur ávirkað livilíkindini og útbreiðsluna hjá eitt nú svartkjafti vestnafyri Írland og hjá kongafiskinum í Irmingarhavinum.

- Óvanliga lýggja veðrið í Føroyum seinastu árini hevur helst eisini samband við broytingarnar í havinum.

Spátt verður, at upphitingin av sonevnda vakstrarhúsáríninum fær pólarnar at bráðna, og hetta kann gera sjógvin so mikið feskan, at hann ikki longur søkkur.

- Tí kann heita rákið fram við Føroyum vikna, og økið kring Føroyar aftur gerast nógv kaldari, heldur Fiskirannsóknarstovan.

# Jákup og Niclas Heri í leiðsluna á Kambsdali

**Regin Hammer, nevndarformaður í fyritøkuni, P/F Esmar Simonsen, sigur, at fyritøkan á Kambsdali er ikki seld**

IKKI SØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er rætt, at fundur hevur verið millum P/F Esmar Simonsen øðrumegin og Jákup Mikkelsen og Niclas Hera Jákupsson í Klaksvík hinumegin, men talan er tó ikki um samráðingar um eina keypsavtalu millum partarnar.

Regin Hammer, nevndarformaður í fyritøkuni, P/F Esmar Simonsen, sigur, at partarnir í fyrsta lagi hava gjørt eina avtalu um samstarv, har Jákup Mikkelsen og Niclas Heri Jákupsson eru ein partur av leiðsluni í felagnum.

- Soleiðis, sum støðan er beint nú, standa Jákup Mikkelsen og Niclas Heri Jákupsson fremstir í bíðirøðini, um fyritøkan verður seld, men eg vil leggja dent á, at avtala um keyp verður ikki gjørd í fyrstu syfti.

Regin Hammer vísir á, at samstarvið millum partarnar byggir á, at Jákup Mikkelsen og Niclas Heri Jákupsson ætla at keypa fyritøkuna, men enn er eingin keypsavgerð er tikin.

# Fakfeløgini ov smá ov veik

**Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir, at fakfeløgini í Føroyum verða færri, størri og sterkari - og við eini vælvirkandi umsiting**

FAKFELØG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Lat tað beinanvegin verða sagt, at fakfeløgini ikki er okkara borð, men vit loyva okkum kortini at seta fram eitt ynski.

Soleiðis sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag í nýggja bóklinginum, sum felagið gav út á Vinnudegnum 2005.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir, at fakfeløgini í Føroyum verða færri, størri og sterkari og við eini vælvirkandi umsiting.

Í bóklinginum verður lagt aftrat:

- Onkur heldur kanska, at tað er lættari hjá arbeiðsgevarafelagnum at samráðast við smá feløg heldur enn stór, tí Føroya Arbeiðsgevarafelag sjálvt er stórt.

Men, verður lagt aftrat:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag upplivir veruleikan øðrvísi. Støðan er ofta ógreið og fløkt, tí fakfeløgini innanhýsis hava ilt við at samskipa síni áhugamál.

FAG nevnir, at eitt nú til samráðingarnar í vár kundi felagið ikki biðja arbeiðarafelag koma til samráðingarborðið, tí felagið visti ikki, hvørji arbeiðarafeløg fóru at samráðast saman.

- At fakfeløg eru spjødd, ger tey eisini fíggjarliga veik, so trupult verður hjá teimum at seta fólk í starv at fáa til vega neyðugu hagtølini til samráðingarnar, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag.


BYGGIBÚÐ
damor


einans
2.698,-
Bæðirúmsmøbil
Úr herdaðum glasi/stáli
B x D x H : 80 x 60 x 81
Elegant design
við einari hill í neðra
uttan krana


598,-
Nilfisk alto trýstspulari
- Sera dygdargóður trystspulari.
- 100 bar
- Sera lættur og nemmur at nýta
- Góður til alt arbeiði rundt húsið, bilin og bátin
- Sápudunkur og 2 ymiskar dysir fylgja við


598,-
Alpha Tools Vinkulslípari
- 2000 watt
- 6500 snúningar / min
- Slow start
- Kann brúka upp til 230 mm skivur
- 4 skivur fylgja við


798,-
Alpha tools Fresari
- 1020 watt
- 31000 snúningar / min
- Brúkar 8mm knívar
- 12 knívar fylja við

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor